## B68 vann í Klaksvík

Um vikuskiftið var árliga Klaksvíkskappingin í Klaksvík, sum upprunaliga mátti útsetast, tí kavin darvaði. Tá avtornaði, vann B68 kappingina eftir 3-2 sigur á ÍF í finaluni í gjár. Frammanundan høvdu KÍ og TB spælt um triðja plássið, og tann dystin vann KÍ 2-1. Í innleiðandi dystunum, sum vóru leygardagin, vann B68 5-2 á TB og ÍF vann 2-0 á KÍ.



## Costin heldur fram

Tjaldur hevur um vikuskiftið gjørt nýggjan eitt ára sáttmála við Costin Dumitrescu, sum í vetur hevur vant ungdómsdeildina hjá felagnum. Í tíðindaskrivi sigur nevndin í Tjaldri, at hon metir, at við Costin sum venjara kann Tjaldur mennast til eitt enn størri felag. Í kappingunum hjá teimum yngru í vetur hevur Tjaldur vunnið eitt gull- og trý silvurmerki.

# HB tók fyrsta steypið

**Annað árið á rað megnaði HB at vinna Stórsteypadystin, sum Lions Club og Fótbóltssambandið skipa fyri – og so er fótbólturin altso aftur farin á rull...**



einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Seinnapartin í gjár varð føroyska fótbóltskappingin sparkað í gongd, tá føroyameistararnir í HB og steypavinnararnir í Víkingi hittust í ársins Stórsteypadysti á ovara vølli í Gundadali. Hetta er dystur, sum Lions Club í Føroyum og Fótbóltssambandið skipa fyri í felag.

Hetta var fjórðu ferð, at hesin dystur var fyriskipaður eftir núverandi leisti, og meðan hetta var triðju ferð, at HB var við, var hetta fyrsti dysturin av hesum slagnum hjá Víkingi. HB vann í fjør og hevur havt stóra Lions-steypið standandi í sínum steypaskápi, og tá dysturin í gjár var liðugur, fór steypið aftur í sama skáp.



**Økisforsetin hjá Lions Club í Føroyum, Niels Nattestad, handaði liðformanninum hjá HB, Fróða Benjaminsen, stóra Lions-steypið, ið HB aftur í ár kemur at hava í varðveitslu**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

HB vann dystin 2-1, og ikki vóru meira enn 11 minuttir farnir, tá Fróði Benjaminsen gjørdist leysur í brotsteiginum hjá Víkingi og skoraði trygt. Tá kundi tað sama verið 2-0, tí longu í fyrsta álopinum hjá HB hevði Andrew av Fløtum ein stóran møguleika, men rakti ikki málið.

Liðini raktu bæði málið ímóti endanum á fyrra hálvleiki, men meðan royndin hjá Víkingi endaði á stongini, endaði tann hjá HB á yvirliggjaranum, og tí var støðan 1-0 til HB, tá spælararnir sluppu at hvíla seg millum hálvleikirnar.

### Tvey mál aftrat

HB hevði samanumtikið havt munin í fyrra hálvleiki, men eftir steðgin var Víkingur nógv meira við, so tí kom tað kanska ikki so óvart á, at toppskjúttin í fjør, Finnur Justinussen, javnaði til 1-1 stutt inn í seinna hálvleik. Hetta gav teimum ljósabláu enn meira trúgv upp á tað, og nú sat Víkingur í eina løtu á tí nógva.

Hevði dysturin endað við javnleiki, hevði verið neyðugt við brotssparkskapping fyri at fingið hann avgjørdan, og leingi sá út til, at tað kundi gerast endin. Men fimm minuttir fyri tíð var Rógvi Poulsen á blettinum fyri HB og skoraði til 2-1, ið eisini gjørdist endaliga úrslitið.

Sostatt hevur HB sum tað fyrsta liðið vunnið tveir Stórsteypadystir. Sum vanligt, tá so lítið er runnið av árinum, var spælið hjá hvørgum liðnum serliga polerað, men báðir partar royndu sítt besta, og í løtum var tað slett ikki so galið.

**Stórsteypadysturin 2010**

**HB-Víkingur 2-1 (1-0)**
**1-0:** Fróði Benjaminsen, 11.
**1-1:** Finnur Justinusen, 55.
**2-1:** Rógvi Poulsen, 86.



**Dagligi leiðarin og ráðgevin hjá KRIS, Gvøðbjørg West, gjørdist sjónliga ovfarin, tá hon fann útav, hvussu stóra upphædd felagsskapurin fekk eftir Stórsteypadystin í gjár**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

# 50.000 krónur til KRIS

Sum vanligt, var árligi Stórsteypadysturin í gjár eisini til frama fyri eitt vælgerandi endamál, og hesa ferð var tað felagsskapurin, KRIS, sum veitir teimum hjálp og vegleiðing, sum hava verið fyri kynsligum ágangi. Felagsskapurin hevur í ár 10 ár á baki.

Hesa ferð varð handanin av pengunum beint eftir dystin, og í tí sambandi var dagligi leiðarin og ráðgevin hjá KRIS, Gvøðbjørg West, komin at taka ímóti. Men tá Niels Nattestad, økisforseti hjá Lions Club í Føroyum, kunngjørdi upphæddina, var hon sjónliga ovfarin.

Niels Nattestad fortaldi, at góðar 38.000 krónur vóru komnar inn í sambandi við dystin, men at Lions Club rundaði upphæddina uppeftir, so KRIS fór at fáa 50.000 krónur.

Undanfarnu árini er ágóðin frá Stórsteypadystinum farin til verkætlanina »Tú hevur rætt« hjá Barnabata, Sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn og ungdómsdeildina hjá Føroya Barnaheimi.

**hil**